# Altjóða hvalaveiðifundur í Havn

**Heimfelagsskapur hvalaveiðimanna fer í komandi viku at halda ársfund í Norðurlandahúsinum**



*Hvalur og hvalaveiða verða viðgjørd á altjóða hvalaveiðifundi í Norðurlandahúsinum í næstu viku*

HVALAFUNDUR
*Edvard Joensen*

Komandi vikuskifti fer Heimsráð Hvalaveiðimanna at halda fund í Føroyum. Fundurin verður í Norðurlandahúsinum hósdagin og fríggjadagin í næstu viku.

Evnið, sum viðgjørt fer at verða á fundinum, er hvalaveiða í framtíðini. Tað eru nevniliga ikki bara føroyingar, sum veiða hval, hóast vit kanska kenna tað sum, at so er.

Luttakararnir á fundinum verða umleið 70 í tali, og teir koma víðan úr heimi. Bæði úr USA og Kanada koma luttakarar, eins og úr Japan, Ný Sælandi og Karibisku londunum. Sjálvandi eru eisini íslendingar, grønlendingar norðmenn við, verður sagt í tíðindaskrivi frá Grindamannafelagnum, sum sent er um dagarnar.

Grindamannafelagið sigur í tíðindaskrivinum um Heimsráð Hvalaveiðimanna, at talan er um altjóða felagsskap, ið hevur sum endamál at virka fyri og verja rættin hjá limunum til mentunarliga, samfelagsliga og búskaparliga menning, sum er grundað á framhaldandi burðadygga gagnnýtslu av tí tilfeingi, sum í havinum er.

Ein slíkur fundur er at meta við ein altjóða pall, har allir luttakararnir kunnu bera fram síni sjónarmið, sum eisini fer at verða gjørt, vænta fyrireikararnir.

Málini, sum sett verða á skránna, fara at snúgva seg um burðardygga nýtslu av havsins súgdjórum, hvali og kópi. Fundarluttakararnir fáa so høvi at siga sína hugsan og greiða frá sínum royndum og sjónarmiðum, eins og eisini verður lagt upp til kjak luttakaranna millum um evni, sum mett vera at hava felags áhuga og týdning.

Eisini á matskránni, sum hoyrir stevnuni til, verður hvalurin at finna. Vertirnir í Føroyum, Grindamannafelagið, hevur skipað so fyri, at kokkar ymsastaðni úr heiminum fara at matgera við slíkum, sum av hvali er. Tilgjørt á ymsan hátt eftir sum tað kemur frá. Tað verða kokkarnir á Hotel Hafnia, Guðmundur Guðmundsson og Kristvin Jacobsen, sum fara at samskipa hesa matskránna.

# Fjølbroytt vetrarskrá í SvF

**Um mánaðarskifti fór SvF so smátt undir vetrarskránna tá undirhaldssendingarnar SATSA og Borð um borð komu á skánna. Mánadagin fer vetrarskráin veruliga av bakkastokki**



*SvF fer nú at seta vetrarskránna í gongd. Á skránni verður nógv fjølbroytt*

SJÓNVARP
*Ingrid Bjarnastein*

Umleggingar av tilfarinum í SvF verða veruliga settar í verk mánadagin. Føroysku sendingarnar, sum verða at síggja í vetur koma á skránna, og meira verður til børnini enn áðrenn.

Vikudagar sleppa børnini framat longu klokkan 18.00 ístaðin fyri klokkan 18.30 sum áðrenn. Nú verður tilfar til børnini í ein heilan tíma. Sendingar til ungdómin, sum hava verið vístar mikudagar, verða nú fluttar til leygardag seinnapart. Mikukvøldið verður tí merkt av léttari undirhladi og dokumentarsendingunum, m.a úr savninum.

## Endursendingar

– SvF ásannar, eins og støðirnar í londunum rundan um okkum, at um tú vilt hava tínar egnu sendingar sæddar, so er ikki nóg mikið at senda tær bara einaferð ella tvær. DR endursendir onkrar sendingar upp í seks til sjey ferðir og BBC hevur eisini tað fyri, at endursenda eina sending upp til 20 ferð í eini viku, sigur SvF í tíðindaskrivi.

Føroyski hyggjarin fjakkar nógv millum ymsu rásirnar, og fyri at geva øllum møguleikan at síggja sendingarnar nógv orka er løgd í at gera, er neyðugt at senda sendingarnar fleiri ferðir. Tí verða allar undirhalds- og mentanarsendingar endursendar tvær ferðir í vetur. Einaferð seint um kvøldið ella í um vikuskiftið og so einaferð afturat tíðliga um kvøldið. Aktuellar sendingar verða endursendar einaferð, oftast dagin eftir, tær hava verið sendar fyrstu ferð.

SvF, sum fyri stuttum legði 4. dag og viku tíðindasendingina á skránna, fer at halda fram á henda hátt í vetur. Afturat hesum verða aktuellar sendingar hvørt mánakvøld, týskvøld og hóskvøld í vetur.

Tær verða Breddin, Kjakið og Fokus. Breddin verður føst sending eftir Dag og Viku mánakvøld. Breddin er at síggja sum ein journalistisk sending, har djúpari verður farið inn í málini enn vanligt. Evni verða tikin fram, sum krevja meira viðgerð enn møguligt er at gera til eina tíðindasending. Í Breddanum verður pláss fyri bakgrund, reportasju, gestum og samandráttum.

Annað hvørt týskvøld eftir Dag og viku verður Kjakið á skránni. Har verður høvi at hoyra sjónvarmið frá fleiri pørtum í senn. Eisini er ætlainin, at luttakarnir kunnu grundgeva meiri gjølla fyri sínum sjónarmiðum. Kjakið verður merkt av politiskum spurningum, men pláss verður eisini fyri øðrum evnum. Millum tveir og fýra luttakarar verða við hvørja fer, saman við vertinum Øssur Winthereig.

Tá Kjakið ikki er á skránni verður Fokus eftir Dag og Viku. Tá verður ein samrøða við ein persón, sum er knýttur at teimum hendingum, sum eru frammi júst tá.

Grannar Okkara verða nú á skránni eftir Dag og viku hóskvøld.

## Undirhald og barnasendingar

Heilt inn til mars komandi ár verður SATSA á skránni hvørt leygarkvøld. Fyrst eru 26 innleiðandi umfør, síðani tríggjar triðingsfinalur og endað verður við eini stórari finalu, har sigursharrin fer avstað við 50.000 krónum.

Umframt SATSA eru framleiddar 14 sendingar afturat av Borð um borð, so henda undirhaldssendingin verður á skránni til desember mánaða.

Ein nýggj fiktiónsrøð er gjørd til børn. Serlingar, sum nýggja sendingin kallast er á skránni hvørt fríggjakvøld. Regin D. Patursson er maðurin aftanfyri hugskot og handrit, og Hans Petur Hansen hevur staðið handan filmstólið. Eisini verður røðin ! á skránni, sum Vár Berghamar Jacobsen skipar fyri. Hon ger samrøður við børn um ymisk evni, og í hvørjari sending kemur eisini eitt idol hjá børnunum at vitja.

Jólasendingarnar eru longu umhugsaðar, og tær verða í ár framleiddar í samstarvi við Útvarp Føroya. Tað verða Vár Berghamar Jacobsen, Páll Danielsen, Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein, sum fara at gera jólasendingarnar í ár.

– Kokkasendingarnar koma aftur í nýggjum líki. Talan verður um stytri sendingar, sum savna seg um ein rætt, og har meira verður gjørt burturúr eitt nú, hvaðani rávørurnar koma. Vertirnir verða tveir: Guðmundur Guðmundson og Kristvin Jacobsen. 20 sendingar verða framleiddar og tær verða sendar fríggjakvøld ímillum Dag og viku og Gekkin, sigur SvF í tíðindskrivi.

Undan væðingini er ein nýggjur táttur hjá SvF. Sendingarnar eru her gamlar sendingar úr savninum, sum verða vísar í síni heild. Malan Johannesen verður vertur í sendingunum, og hon fer at greiða frá og innleiðir í hvørjari sending við bakgrundini til sendingina. Undan væðingini verður hvørt mikukvøld í vetur.



# Uppboðssølan havt ómetaliga stóran týdning

**Olaf Olsen sigur, at uppboðssølan hevur havt við sær, at marknaðarprísurin hevur sligið ígjøgnum til skipini, og hetta er í sjálvum sær ein stór broyting.**
**- Uppboðssølan hevur eisini viðvirkað til, at dygdin á fiskinum er vorðin betur, og hugburðurin er broyttur, sigur nevndarformaðurin í Fiskamarknaði Føroya.**



*- Uppboðssølan hevur fullkomiliga broytt mynstrið í samband við sølu og keyp av fiski, og einki ivamál er um, hvønn týdning hetta hevur havt, sigur Olaf Olsen, nevndarformaður.*
*Mynd: Edvard Joensen*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Saman við Jógvani I. Olsen, Páll Gregersen og øðrum góðum monnum, var Olaf Olsen ein teirra, sum gekk á odda til stovnan av Fiskamarknaði Føroya, sum týsdagin hevði 10 ár á baki.

Tað vóru minni enn so øll sum trúðu, at hugskotið við eini ella fleiri uppboðssølum í Føroyum var nakað gott hugskot.

– Eg vil siga, at tað vóru fáir, sum høvdu mót um, at hetta fór at bera til, bæði fíggjarliga og á annan hátt. Tað var eisini tungt tey fyrstu 3-4 árini, og rakstrarúrslitið javnvigaði á eini knívsegg, ásannar sigur Olaf Olsen, nevndarformaður í Fiskamarknaði Føroya, sum saman við fýra øðrum privatpersónum eisini setti nakrar krónur í felagið.

Í dag, 10 ár seinni, gongur hampiliga væl hjá Fiskamarknaðinum.

Olaf sigur, at nú er fastari undir fótum, men í slíkum arbeiði verður ongantíð komið á mál.

– Ein hugburðsbroyting er komin so við og við, og eg vóni, at Fiskamarknaður Føroya er komin fyri at vera, sigur hann.

Onkuntíð verður tosað um fleiri uppboðssølur, t.d. eina í Klaksvík, eina í Vági og eina í Sørvági, men tað rætta er, at vit hava bara eina uppboðssølu í Føroyum, og hon er á Toftum. Hitt eru landingarmiðstøðir, sum virka í tøttum samstarvi við skrivstovuna á Toftum.

## Veldugan týdning

Olaf Olsen sigur, at Fiskamarknaður Føroya hevur havt ómetaliga stóran týdning fyri føroyska fiskivinnu.

– Uppboðssølan hevur fullkomiliga broytt mynstrið í samband við sølu og keyp av fiski, og einki ivamál er um, hvønn týdning hetta hevur havt. Við uppboðssøluni kundu skip og bátar selja fiskin í smáum – og ikki sum fyrr, har virkini eisini noyddust at keypa tey fiskasløg, sum tey ikki vildu hava og sum meira vóru til fortreð enn nakað annað.

Olaf vísir á, at tá ið uppboðssølan kom, kundu skipini selja t.d. havtasku og hvíting til teirra, sum vildu hava hesi fiskasløg og kundu geva meira fyri tey.

– Soleiðis øktist prísurin á ymiskum fiskasløgum, sum lítið fekst av, 2-5 ferðir og havtaskan, sum virkir áður lótu 3, 4 ella 5 krónur fyri, verður nú seld fyri 20-30 krónur fyri kg. Nýggja skipanin gjørdi, at virkir kundu leggja seg eftir ávísum fiskasløgum og keypa hesi burtur úr eini stórari last av fiski.

## Marknaðarprísurin sligið ígjøgnum

Olaf sigur, at uppboðssølan hevur havt við sær, at marknaðarprísurin hevur sligið ígjøgnum til skipini, og hetta er í sjálvum sær ein stór broyting.

– Uppboðssølan hevur eisini viðvirkað til, at dygdin á fiskinum er vorðin betur, og hugburðurin í hesum sambandi er broyttur, sigur nevndarformaðurin í Fiskamarknaði Føroya, Olaf Olsen.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur sett krav fram um, at landingarmiðstøðir skulu hava móttøkuhøli við køling, men enn er langt á mál.

Á Fiskamarknaði Føroya arbeiða tey við at fáa hesi viðuskifti uppá pláss.

# Nýggju trolararnir hjá Beta ein mánaða seinkaðir

**– Sambært sáttmálanum skuldu vit yvirtaka skipini, 27. september, men nú verður tað ikki fyrr enn síðst í oktober, sigur Olaf Olsen, reiðari.**




FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nýggju trolararnir, sum P/F Beta letur byggja á Astilleros M. Cies í Vigo í Spaniu, vórðu flotaðir ávikavist 21. og 26. august. Skipini hava bygningsnummar 111 og 112.

Í Vigo eru einar 8-10 skipasmiðjur, og av hesum er M. Cies ikki ein av teimum stóru og heldur ikki ein av teimum gomlu.

Skipasmiðjan hevur júst leverað ein nýbygning til eitt felag í Spaniu, og áðrenn hesin varð latin, hevði M. Cies saman við báðum skipunum hjá Beta fimm skip í gerð samstundis.

## Seinkaðir

Olaf Olsen, reiðari, sigur, at arbeiði við skipunum hevur gingið hampiliga væl, men nú tað líður ímóti endanum, er greitt, at trolararnir verða seinkaðir ein mánaða ella so.

- Sambært sáttmálanum skuldi yvirtøkan verða, 27. september, men nú verður hon ikki fyrr enn síðst í oktober.

Reiðarin sigur, at skipasmiðjan hevur havt nógv at gera, og orsøkin til seinkingina er, at heldur lítil arbeiðsorka hevur verið tøk okkurt skifti til føroysku trolararnar.

Nú skipini vórðu flotaði fyri einum mánaði síðan, vóru skrokkarnir málaðir upp til lúnningina, men brúgv, gálgar og mastrar vóru ómálað.

Á dekkinum vóru spølini ikki komin upp at standa, tí dekkið skuldi fyrst sandblásast.

Tá ið Sosialurin tosaði við Olaf mikumorgunin, visti hann, at tríggir mans frá maskinverkstaðnum, FJM í Runavík, vóru farnir til Spaniu at seta arbeiðsdekkið upp.

- Hetta eru pavnar, kryvjilinja, flutningsbond og annað til dekkið og lastina, sigur hann.

## Eingi nøvn og skiparar

Olaf Olsen vil enn ikki siga, hvussu nýggju skipini fara at eita; tí eru nøvnini framvegis bara bygningsnr. 111 og 112.

Spurdur, hvørjir skiparar fara niður til Spaniu eftir trolarunum, sigur Olaf, at hann vil ikki tosa alment um nøvn enn.

Sosialurin ivast tó ikki í, at bæði nøvnini á skipunum og nøvnini á skiparunum eru komin uppá pláss, men eingin orsøk er hjá reiðarínum at avdúka hesi, fyrr enn tíðin er komin.

*Myndirnar eru tiknar, tá ið nýggju trolararnir hjá Beta vórðu flotaðir í Vigo, 21. og 26. august.*

